| **Heiti á verkætlan:**<br>Undirsjóvar kameraútgerð<br>(Trawl Camera) | **Ár byrjan og endi:**<br>Byrjan 2009 – endi 2011 |
|---|---|
| **Skrivað hevur:**<br>Navn: Sofus S. Gregersen<br>Stovnur ella virki: P/F Jóannes Thomsen<br>JT Electric (JT)<br>t-postur: sofus@jt.fo | |

**Endamálið við verkætlanini:**

At menna eitt undirsjóvar trolkamera (TC) við ljósi til fiskiskap á grunnum og djúpum vatni. Ætlanin er at selja TC og ljósini til fiskiskip kring allan heimin.


**Samandráttur av úrslitum:**

Trolkameraið (TC) hevur verið í menning í nøkur ár fyri 2009, men tað lidna TC svaraði ikki heilt til tað, sum kundarnir vildu hava. Tí var í 2009 av álvara farið undir at menna design og innmat soleiðis, at TC lýkur allar treytir fyri myndagóðsku, brotstyrki á húsanum, hydrodynamikki, design, nýtsluvegleiðing og flyting av myndum frá TC til telduna.

Hetta er í 2011 komið á mál soleiðis, at TC nú verður selt kring allan heimin og tað sær út til, at 2012 verður árið, har TC veruliga fær breiða útbreiðslu. Bara í des. 2011 eru uml 12 eindir bílagdar umframt tær uml. 20 eindirnar, sum frammanundan eru bílagdar.

Framleiðslan er í gongd og eindirnar vera latnar keyparunum so hvørt tær eru lidnar. Eftirspurningurin sær út til at vera komin rættuliga í gongd nú tað frættist millum manna, at TC riggar eftir ætlan og hevur allar bestu myndagóðskuna.

Á næstu síðu er ein roknskaparlig uppgerð av TC-verkætlanini.

## Roknskaparlig uppgerð av TC:

| Fíggjarligt status fyri Trolkamera, 31/12-2011 | | Kostnaðar-ætlan smb. umsókn kr. | Roknskapur 2009 - 2011, kr. | Mett restina av árinum, kr. |
|---|---|---|---|---|
| **Inntøkur** | Fiskivinnuroyndir, goldið | 350.000 | 350.000 | 0 |
| | Fiskivinnuroyndir, ikki goldið enn | 350.000 | 350.000 | 0 |
| | Eginfígging | 1.272.500 | 2.333.162 | 0 |
| | Onnur fígging | 0 | 0 | 0 |
| | Í alt | **1.972.500** | **3.033.162** | **0** |
| **Útreiðslur** | Lønir | 1.032.000 | 1.453.597 | 0 |
| | Keyp av vørum og tænastum | 767.500 | 1.232.865 | 0 |
| | Leiga/keyp av maskinum/tólum o.ø. | 25.000 | 133.750 | 0 |
| | Rakstrargjald | 98.000 | 212.950 | 0 |
| | Ymiskt | 50.000 | 0 | 0 |
| | **Í alt** | **1.972.500** | **3.033.162** | **0** |

| **Váttan frá verkætlanarleiðara:** | **Váttan frá grannskoðara:** |
|---|---|
| Kambsdali, 18. jan. 2012<br><br>Sofus S. Gregersen | Sí serskilda váttan |

NOTA
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

P/F Jóannes Thomsen
Kambsenni 3
FO-530 Fuglafjørður

30 JAN. 2012

**Váttan av útreiðslum í sambandi við verkætlanina " Trawl Camera "**

| Fíggjarligt status fyri Trolkamera, 31/12-2011 | | Kostnaðarætlan smb. umsókn, kr. | Rokskapur frá 2009 til 2011, kr. |
|---|---|---|---|
| **Inntøkur** | Fiskivinnuroyndir, goldið | 350.000 | 350.000 |
| | Fiskivinnuroyndir, ikki goldið enn | 350.000 | 350.000 |
| | Eginfígging | 1.272.500 | 2.333.162 |
| | Onnur fígging | 0 | 0 |
| | **Tilsamans** | **1.972.500** | **3.033.162** |
| **Útreiðslur** | Lønir | 1.032.000 | 1.453.597 |
| | Keyp av vørum og tænastum | 767.500 | 1.232.865 |
| | Leiga/keyp av maskinum/tólum o.ø. | 25.000 | 133.750 |
| | Rakstrargjald | 98.000 | 212.950 |
| | Ymiskt | 50.000 | 0 |
| | **Tilsamans** | **1.972.500** | **3.033.162** |

**Váttan frá grannskoðara**
Vit hava fingið eina áheitan frá P/F Jóannes Thomsen um at vátta útreiðslur viðvíkjandi menning av undirsjóvar kameraútgerð. Váttanin skal nýtast í sambandi við umsókn til Fiskivinnuroyndir um stuðul viðvíkjandi menning av fiskireiðsskapi.

**Um okkara arbeiði**
Í sambandi við alment viðurkendar grannskoðanarreglur er grannskoðanin skipað og framd við tí endamáli at fáa eina grundaða sannføring um, at tað ikki eru týðandi feilir ella vanta týðandi upplýsingar í uppgerðini. Undir grannskoðanini hava vit, eftir meting um týdning og risiko, kannað grundarlag og prógv fyri upphæddum í uppgerðini. Vit hava harumframt mett, um upplýsingarnar í uppgerðini sum heild eru nøktandi.

**Niðurstøða**
Tað er okkara fatan, at omanfyri standandi útgreining av uppgerðini fyri tíðarskeiði 2009 - 2011 viðvíkjandi menning av undirsjóvar kameraútgerð gevur eina rætta mynd av kostnaðinum, ið felagið hevur havt í sambandi við hesa verkætlan.

Tórshavn, hin 18. januar 2012

**NOTA**
Løggilt grannskoðanarvirki

Jørmann Petersen
løggildur grannskoðari

Jóanes Olsen
skrásettur grannskoðari

FISKIMALA...

- 1. FEB. 2012

J. NR. 12/00059-6

P/F nr. 3752
Hoyvíksvegur 5
P.O.Box 30
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands
Phone (+298) 351700
Fax (+298) 351701
E-mail nota@nota.fo
www.nota.fo